# VIKUSKIFTI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

*- Eitt træ skal doyggja fyri, at tú kanst gera ein bass, so tí mugu vit hava høg góðskukrøv. Eg haldi ofta, at bløðini gloyma tað, at trø mugu doyggja fyri, at tey skulu útkoma, og at hetta setur krøv til góðskuna*

*Øssur Johannesen*

# Øssur Johannesen leitar aftur til tað melidiøsa

**Á konsertum hetta vikuskiftið fer Øssur Johannesen m. a. at spæla tónleik av komandi útgávuni hjá sær, ið leitar aftur til meira melidiøsa tónleikin, ið var á fyrstu fløguni hjá Øssuri**



*Á konsertini væntar Øssur at spæla okkurt av komandi útgávuni, onkrar improvisatiónir og kanska lesur hann eina yrking, ið hann hevur skrivað á læstu deild*

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Øssur Johannesen spælir hetta vikuskiftið konsertir í Kagganum í Havn og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hann er triðja navnið á plakatini á útgávukonsertunum við 200 og Marius. Men meðan 200 og Marius er bólkar er Øssur einsamallur maður á pallinum.

Øssur Johannesen hevur á sínum solofløgum og saman við Hjalta Joensen skapt nakrar heilt serligar tónleikaupplivingar. Øssur og bassurin klæða óvanliga væl hvør øðrum, og skapa saman villar og óvanligar upplivingar, ið eru heilt egnar og best kunnu lýsast sum kensluligar útferðir, har tónleikurin málar ofta ógvusligar kenslur. Øssur dyrkar bassin sum soloinstrument og arbeiðir nógv við dynamikki og temposkiftum. Hann letur seg ikki binda niður av genrum ella vanahugsan, men ferðast í øllum genrum við sínum tónleiki.

Ætlanin var, at Øssur skuldi spæla á G!Festivalinum, men hann var noyddur at geva avboð.

- Eg eri keddur av, at eg varð noyddur at avlýsa konsertina hjá mær á G!Festivalinum, men tað er gott, at sleppa at spæla aftur. Eg gleði meg til at hita upp fyri 200. Eg haldi teir eru ein vulkan av orku, sigur Øssur.

Hann vísir á, at honum dámar tað, at 200 er so uppreistrarsinnaður.

- Tekstirnir hjá teimum eru stuttligir, men viðkomandi, sigur Øssur.

## Høg góðskukrøv

Øssur setur høg góðskukrøv til bæði sínar fløgur og til sínar framførslur.

- Eitt træ skal doyggja fyri, at tú kanst gera ein bass, so tí mugu vit hava høg góðskukrøv. Eg haldi ofta, at bløðini gloyma tað, at trø mugu doyggja fyri, at tey skulu útkoma, og at hetta setur krøv til góðskuna.

Fyri at vera til reiðar til framførsluna, mediterar Øssur altíð ein tíma, áðrenn hann skal á pallin, soleiðis verður eisini hesaferð.

Á konsertini væntar Øssur, at tað sum hann spælir er okkurt av komandi útgávuni, onkrar improvisatiónir og kanska lesur hann eina yrking, ið hann hevur skrivað á læstu deild.

## Ambitiøs útgáva

- Mín komandi útgáva er tann mest kostnaðarmikla og ambitiøsa higartil. Hetta er ein dupult fløga og DVD, greiðir Øssur frá.

- Fyri at útgávan skal blíva til nakað, skal ymiskur stuðul koma upp á pláss, men eg vænti, at tað fer at ganga, sigur hann.

Tann eina fløgan verður við yrkingaupplestri, hin verður við solobassi og DVD'in verður við ymiskum konsertupptøkum, framsýningum og samrøðum.

Á fløguni við solobassi fer Øssur aftur til tað melidiøsa, ið vit kenna av fyrstu fløguni hjá honum. Her verður talan um egnar kompositiónir og nøkur coverløg. Coverløgini verða tó spæld á Øssursa egna hátt. Serliga ambitiøst er eitt 17 minuttir langt verk, eitt bland, av lagnum Kashmir hjá Led Zeppelin, einum syrgiligum melodii hjá Tchaikovsky, Gypsi hjá Uriah Heep, Hall Of The Mountain King úr Per Günt hjá Grieg og lagnum The Park hjá Uriah Heep.

## Gamlir skurar

Sum myndlistamaður er Øssur enn virkin. Næsta framsýningin við listamanninum, verður tó ikki við nýggjum verkum.

- Eg havi fingið fatur í teimum linoleumsskurunum, sum eg gjørdi í Danmark í 90'unum, og eg fari at endurprenta teir, og ætli at sýna teir fram í gallaríinum hjá Zacarias Wang, sigur Øssur.

Nær hetta verður er tó enn ikki heilt greitt

Konsertin í Kagganum er fríggjakvøldið 25. august, meðan konsertin í Fuglafirði er leygarkvøldið 26. august. Við sær hava 200, Marius og Øssur rokk plátuvendaran DJ Sakin Spakin.

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

# Eingin mjørki á Fjarðafestivalinum



VEÐRIÐ

Tað sær ikki út til, at Fjarðafestivalurin fær sama trupulleika við mjørkanum, sum bæði G! Festivalurin og Summarfestivalurin høvdu.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, metir um veðrið í vikuskiftinum, og hann sigur, at tað verður eingin mjørki í vikuskiftinum. Seinnapartin í dag verður veðrið turt, og sólin sær kanska í glottum. Tó skulu vit ikki vænta okkum rættiligt summarveður, men heldur passaligt festivalveður.

Leygardagin verður lítil vindur og møguliga sól. Tað verður framvegis turt og klárt í veðrinum. Hitin verður millum 10-13 stig.

Sunnunáttina fáa vit regn. Sunnudagin verður framvegis lítil vindur, og møguliga ælaveður eisini.

Mánadagin og týsdagin verður ælaveður, og vindurin kemur frá landnyrðingi. Tað verða møguliga einkultir sólglottar. Hitin verður millum 8 til 11 stig.

Veðrið sær út til at hilnast væl hjá fyriskiparunum av Fjarðafestivalinum.

